## UTTAN ÚR HEIMI

### Styðjar eisini Kerry

Í síðstu viku kunngjørdu fleiri av teimum størstu bløðunum í USA, at tey vilja hava John Kerry til forseta, og sunnudagin boðaði uppaftur eitt av bløðunum frá, at tað styðjar Kerry.

Tað er Washington Post. Í oddagreinini skrivaði blaðið, at Kerry er skilabetri enn George W. Bush, at hann er meiri opin enn sitandi forsetin, og at hann er betur egnaður enn forsetin at fáa skil á landsins búskapi. Blaðið fanst samstundis at Bush, tí hann hevur drigið USA upp í krígið í Irak, og odda-greinskrivarin vil vera við, at avgerðin um at leypa á Irak bleiv tikin í skundi og var alt ov illa umhugsað.

Nú hava tey flestu stóru amerikonsku bløðini við The New York Times og Washington Post á odda valt at styðja John Kerry upp undir forsetavalið. Eitt blað í Chicago og nøkur bløð í Texas hava sagt, at tey styðja Bush.

### Virkin smittuberi

Myndugleikarnir í Teilandi hava skuldsett ein 56 ára gamlan týskara fyri at hava smittað umleið 90 teilendskar kvinnur við HIV.

Hans-Otto Schieman hevur vrið sjómaður, og hann hevur búð í Teilandi í mong ár. Fyri trimum árum síðani staðfestu læknarnir, at hann var vorðin smittaður við HIV, men kortini var hann javnan saman við ungum teilenskum kvinnum uttan at nýta nakað, sum kundi fyribyrgja, at hann smittaði kvinnurnar. Sambært skuldsetingini hevur hann havt samlegu við umleið 90 ungum teilendskum kvinnum hesi trý árini.

Í rættinum hevur týskarin greitt frá, at hann hevur verið sera væl umtóktur ímillum kvinnurnar, tí hann átti nógvar pengar. Nú hava myndugleikarnir hongt myndir av honum ymsastaðni, og kvinnur, sum hava verið saman við honum, verða bidnar um at fara til lækna at lata seg kanna, skrivar DPA.

### Rottuplága í Danmark

Fyri nøkrum árum síðani plagdu donsku myndugleikarnir at fáa einar 100.000 fráboðanir árliga frá fólki, sum høvdu trupulleikar við rottum.

Men nú eru fráboðaninar vorðnar umleið 140.000 um árið, skrivar Politiken eftir upplýsingum frá umhvørvisstýrinum. Peter Weile, sum er rottuserfrøðingur hjá umhvørvisstýrinum, sigur við blaðið, at tað eru tær vánaligu kloakkirnar, sum eru orsøkin til, at rotturnar eru farnar at gera meiri um seg. Hann vísir til eina frágreiðing hjá umhvørvisstýrinum, sum sigur, at 16 kilometrar av kloakkkervinum er í so vánaligum standi, at tað má umvælast sum skjótast. Ein annar trupulleiki er, at nógvar av teimum donsku rottunum kunnu eta rottueitur, uttan at tað ávirkar tær.

Sambært Peter Weile eru ímillum ein og tvær milliónir rottur í Danmark. Hann sigur, at nógvar av rottunum eru smittuberar, og at fleiri sjúkur, sum rottur hava í sær, eru lívshættisligar fyri fólk.

### Skilja ikki orðini

Ein kanning í Noregi vísir, at nógv fólk skilja ikki nógv av teimum orðunum, sum fjølmiðlarnir brúka, tá teir skriva ella tosa um ymiskt, sum hevur við vinnulív og búskap at gera.

Eitt nú avdúkar kanningin, at nógv fólk ána ikki, hvat orð sum inflasjón, synergi og iptelefoni merkja. Stjórin í norsku málnevndini, Sylfest Lonheim, sigur við Aftenposten, at alt ov mong tíðindafólk velja at brúka orð, sum lesararnir ella lurtararnir ikki kenna, sjálvt um tað ikki tekur nógvar reglur ella langa tíð at siga týdningin við øðrum orðum, sum øll skilja.

Men tað eru ikki bara fjømiðlafólk, sum sleingja um seg við teimum femmandu orðunum. Sylfest Lonheim sigur, at nógv vinnulívsfólk brúka fremmand orð fyri ikki at avdúka, at tey eru ótrygg, tá tey verða spurd um eitt ella annað. At mong ikki skilja tað, tey siga, hevur minni týdning.

# Fuglakrímið nærkast Evropa

**Í fleiri evropeiskum londum eru myndugleikarnir farnir at fyrireika seg til, at tað herviliga fuglakrímið skal koma hendanvegin**

FUGLAKRÍM
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Serfrøðingar siga, at vandi er fyri, at flytifuglar úr landssynningspartinum av Asia koma saman við evropeiskum flytifuglum í Sibiria og aðrastaðni um hesa tíðina á árinum.

Tað kann hava við sær, at evropeiskir flytifuglar kunnu verða smittaðir við fuglakrími, og at teir hava sjúkuna við sær, tá teir koma aftur hendanvegin. Evropeiski stovnurin EISS, sum heldur eygað við ymsum umfarssjúkum, sigur sambært Ritzau, at tað er rættiliga sannlíkt, at fuglakrímið fer at koma til Evropa.

Í Danmark halda myndugleikarnir, at teir eru væl fyrireikaðir til at taka ímóti fuglakríminum. Kåre Mølbæk, sum er yvirlækni á Serumstovninum, sigur við blaðið metro-Xpress, at donsku heilsumyndugleikarnir eru førir fyri at staðfesta sjúkuna nakrar tímar eftir, at illgruni er um, at onkur kann hava fingið fuglakrím. Fyrr tók tað fjúrtan dagar, sigur yvirlæknin.

# Avrættaðir sum landasvíkjarar



*Teir 48 hermenninir fingu boð um at leggja seg niður. Síðani vórðu teir skotnir*

*Mynd: Reuters*

**Teir 48 iraksku hermenninir, sum vórðu funnir deyðir um vikuskiftið, vórðu avrættaðir, tí mótstøðurørslan metti teir sum landasvíkjarar**

IRAK
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Abu Mussab al-Zarqawi, sum amerikanskararnir hava lovað 25 milliónir dollarar í finningarløn fyri, hevur aftur gjørt um seg. Um vikuskiftið átók hann sær ábyrgdina av hópdrápinum, har 48 irakskir hermenn vórðu avrættaðir.

Hermenninir høvdu verið á venjingarlegu og vóru á veg til hús, tá teir vórðu álopnir. Talsmenn hjá myndugleikunum søgdu, at hermenninir vóru í sivilklæðum, og at teir vóru óvápnaðir. Nærhendis býnum Baquba vóru bussarnir við hermonnunum steðgaðir, hermenninir fingu boð um at leggja seg niður á vegin, og síðani vórðu teir skotnir.

Irakskar keldur søgdu sunnudagin, at álopið á hermannabussarnar var væl fyriskipað, og keldurnar løgdu afturat, at álopið er eisini eitt tekin um, at mótstøðurørslan hevði fingið upplýsingar um, at hermenninir vóru á veg til hús.

USA hevur lagt stóran dent á at manna ein nýggjan irakskan her, men mótstøðurørslan ger alt til tess at forða fyri, at tað skal eydnast. Umframt teir 48 hermenninar, sum vórðu avrættaðir við Baquba, doyðu meiri enn 20 irakskir hermenn í bumbuálopum aðrastaðni í landinum.

– Teitr, sum melda seg upp í herin, verða roknaðir sum landasvíkjarar og skutilssveinar hjá amerikanska hervaldinum, sigur Brynjar Lia, sum arbeiðir á granskingarstovninum hjá norsku verjuni, við Dagsavisen.

Seinastu dagarnar hava amerikanararnir søkt at býnum Falluja, har hildið verður, at Abu Mussab al-Zarqawi heldur til. Yvirgangsserfrøðingar ivast kortini í, at so er. Teir vísa á, at al-Zarqawi hevur eini sjáldsom evni at leiða álop uttan at avdúka, hvar hann sjálvur er staddur.



# Oljuráðstevna umleið 18. januar

RÁÐSTEVNA
*Jan Müller*

Oljuráðstevnan, sum plagar at vera á hvørjum ári um mánaðarskifti november desember verður hesaferð flutt til januar 2005. Ein orsøkin er 2. útbjóðing á landgrunninum. Freistin at lata umsóknir inn til 2. útbjóðing er 17. november. Síðani skal Oljufyrisitingin brúka einar tvær mánaðir til at viðgera umsóknirnar. Ætlanin er tí at kunngera loyvini á oljuráðstevnuni umleið 18. januar í Norðurlandahúsinum. Malan Johannesen frá Vinnuhúsinum sigur, at tey ætla at brúka ein fyrrapart av ráðstevnuni til oljumál og her serstakliga úrslitið av 2. útbjóðing og seinnaparturin fer so til at umrøða okkara høvuðsvinnu og aðrar vinnur. Í hesum sambandi er ísléndskur serfrøðingur boðin at halda fyrilestur. Evnið fer at snúgva seg um, hvussu vit megna at varðveita vælstandin í framtíðar samfelagnum, har tørvur verður á øðrum vinnum eisini enn bert fiskivinnuni. Tað er Oljuvinnufelagið, sum skipar fyri olju- og alternativu vinnuráðstevnuni í januar.

W W W . S O S I A L U R I N . F O




Seinasta freist at lata broytingar inn til telefonbókina 2005 er mánadagin 1. nov. 2004

**Í mars 2005 verður telefonbókin borin út til allar fastnetstelefonfelagar í Føroyum. Virki, handlar og stovnar skulu boða frá av nýggjum, um lýst verður í Gulu síðum. Boðast skal eisini frá, um verandi lýsing ynskist við óbroytt.**

**Hvítu síður**

Mánadagin 1. november 2004 er seinasta freist, at koma við rættingum til Hvítu síður í telefonbókini fyri ár 2005 (vanliga telefonyvirlitið). Rættingarblað til Hvítu síður er á síðu 660 í telefonbókini 2004,og skal sendast til: Kundaskráseting, Føroya Tele, Postboks 27, FO-110 Tórshavn ella faks 31 93 01.

**Eykaupptøkur v.m.:**
Umframt rættingar til navn, bústað, telefonnummar, o.s.fr. ber eisini til at gera nakað serligt burturúr júst tínum telefonnummari, við undirstrikingum, eykaupptøkum og undirupptøkum. Prísurin er 62,50 kr. (íroknað mvg) fyri hvørja undirstriking, eykaupptøku ella undirupptøku.

**Búmerki:**
Eisini ber til at umbiðja búmerki í Hvítu síðum. Prísurin fyri búmerki er 2.000,00 kr. (ikki íroknað mvg) fyri hvørja upptøku.

**Gulu síður**

Mánadagin 1. november 2004 er seinasta freist at boða frá **av nýggjum**, um upptøka ynskist í Gulu síðum.

**Prísir:**
(A) Standardlýsing ................................ kr. 700,00
(B) Innramming ..................................... kr. 800,00
(E) Grafisk lýsing pr. mm (min. 30 mm) . kr. 25,00
(sí dømi á s. 658 í Telefonbókini 2004)

**Litlýsingar:**
Umframt vanligar svart/gular lýsingar, er eisini møguleiki at lýsa við hvítari bakgrund og við litum. Eykakostnaður fyri hvíta bakgrund er kr. 500,00 og fyri litir við hvítari bakgrund kr. 1.250,00.
Skrásetingar-/Rættingarblað til Gulu síður er á síðu 659 í telefonbókini 2004, og skal sendast til:
Føroya Tele, Postboks 27, FO-110 Tórshavn, ella faks 32 11 66.
**GG: Prísirnir á Gulu síðum eru uttan mvg!**

tel 30 30 30 www.tele.fo www.nummar.fo · info@nummar.fo - www.gulu.fo · info@gulu.fo
FØROYA TELE

# NÝGGIR VINNUMØGULEIKAR !

***Gevur altjóða skipaskráseting nýggjar vinnumøguleikar?***

Føroya Sjómansskúli skipar fyri
**RÁÐSTEVNU**
um **altjóða skipaskráseting** fríggjadagin 29. oktober.

***Skrá:***
Hans J. á Brúgv, sjómansskúlastjóri býður vælkomin.

***Innlegg:*** Bjørn Kalsø, landsstýrismaður í fiski- og sjóvinnumálum.
Jan Frits Hansen, undirstjóri í Danmarks Rederiforening.
Óli Hans H. Olsen, stjóri á skipaeftirlitinum.
Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum.
Kristin Rasmussen, sjómansskúlalærari.

Endað verður við orðaskifti.
Ráðstevnan er liðug uml. kl. 15:00

Føroya Sjómansskúli
Maritime College

*Fyrivarni verður tikið fyri møguligum broytingum í skránni.*

petur & petur · 320870